Álit

í

løgtingsmáli nr. 139/2020: Uppskot til løgtingslóg um stuðul til listafólk í sambandi við COVID-19

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, hevur lagt málið fram 13. apríl 2021, og eftir 1. viðgerð 16. apríl 2021 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. og 21. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund LISA, Sláið Ring, Klaksvíkar Dansifelag, KFUM Skótar, leguhúsið í Nesvík og landsstýrismannin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana.

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum hevur lagt uppskotið fram fyri at hjálpa listafólkum, ið hava verið fyri missi vegna koronu. Almennu tilmælini hava gjørt, at møguleikarnir fyri framførslum, framsýningum og øðrum mentanarligum tiltøkum hava verið og framvegis eru avmarkaðir.

Mett verður, at tørvur er á at lata uppaftur fyri møguleikanum hjá listafólki at søkja stuðul. Stuðulsskipanin í hesum lógaruppskoti er lík teirri skipan, sum við løgtingslóg nr. 103 frá 25. juni 2020 um stuðul til listafólk, tónleikafestivalar, almannagagnligar felagsskapir o.o. í sambandi við COVID-19 var galdandi í 2020, tó at ávísar tillagingar eru gjørdar, m.a. at listafólk, hvørs virksemi er skipað í ein løgfrøðiligan persón, eisini kunnu søkja.

Samanumtikið kann sigast, at hjálparpakkarnir hava hjálpt summum á økinum, men við hesum uppskoti fáa fleiri listafólk møguleika at søkja um hjálp í eitt longri tíðarskeið, t.e. eisini fyri fíggjarligt tap í tíðarskeiðnum frá 1. september 2020 til 30. apríl 2021.

Skipanin, ið var galdandi í 2020, fevndi um stuðul til listafólk, tónleikafestivalar, almannagagnligar felagsskapir o.o. í sambandi við COVID-19, meðan verandi uppskot einans fevnir um listafólk. Undir nevndarviðgerðini er komið fram, at tørvur eisini er á eini stuðulsskipan, ið fevnir um almannagagnligar felagsskapir og áhugafeløg. Hesum tekur nevndin undir við, og tí fara limirnir í Mentanarnevndini beinanvegin at seta fram eitt annað, nýtt uppskot til løgtingslóg um stuðul til almannagagnligar felagsskapir, har stuðulsupphæddin til endamálið er 1 mió. kr.

Ein samd nevnd tekur við hesum viðmerkingum undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 26. apríl 2021

Djóni Nolsøe Joensen
formaður

Beinir Johannesen
næstformaður

Jóhannis Joensen

Beinta Løwe Jacobsen

Bjarni Kárason Petersen

Heðin Zachariasen

Edva Jacobsen